# Ókend list fram í ljósið

**Fernisering var í Skálanum fríggjakvøldið. 60 listafólk við tilsamans 235 listaverkum mynda ta avbera flottu og hugtakandi listaframsýningina, Fram í Ljósið, sum Norðoya Sparikassi hevur tikið stig til**

FRAMSÝNING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Rættuliga nógv fólk vóru í Skálanum fríggjakvøldið, tá Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri, setti framsýningina, Fram í Ljósið.

Skálin er av álvara gjørdur um til ein listaskála, og hóast hølið als ikki er roknað til slíkt, so kundi staðfestast, at tað ber avbera væl til at hava eina listaframsýning har.

Allastaðni í húsinum hanga málningar í hesum døgum, og tað fara teir at gera í eina góða viku afturat.

Ferniseringin byrjaði um sjeytíðina, men beinanvegin varð greitt, at tað fór illa at bera til at koma runt, tí har var so nógv fólk. Og hartil skal ein hava sera góðar stundir, tá ein fer til listaframsýningina, um ein ætlar sær at koma runt. Tí har eru so nógv listaverk.



*Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri, lat framsýningina Fram í Ljósið upp í Skálanum fríggjakvøldið. Skálin var stúgvandi fullur av fólki, sum vóru komin til hesa forvitnisligu framsýning*



*Mong fólk høvdu leitað sær vegin niðan í Skálan fríggjakvøldið til ta forvitnisligu og hugtakandi framsýningina, Fram í Ljósið. Hugaligt er at síggja, at tað finnast so mong dugnalig listafólk, sum ein vanliga ikki sær til listaframsýningar*

Men kortini nýttu mong høvi til at hyggja seg um – í tann mun tað bar til, og ferð eftir ferð spurdu fólk, hvør er hetta ella hvør er hasin, tá tey høvdu hugt í skránna og sæð navnið á listafólkinum, sum hevði gjørt listaverkið, sum tey hugdu at.

## Nógv talent

Fram í Ljósið, sum framsýnginin eitur, er til endamáls at fáa minni kend og ókend listafólk, sum vanliga ikki halda seg fram at til framsýningar, fram í ljósið. Og má sigast, at endamálið varð nátt væl og virðiliga.

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum lat framsýningina upp, og hann helt millum annað fyri, at henda framsýningin er eitt gott prógv um, hvussu nógv dugnalig listafólk eru í Føroyum.

– Nú havi eg av góðum grundum ikki fingið møguleika til at hyggja meg um av røttum, men tað sum eg síggi bara her eg standi, tað boðar frá góðum, segði Jógvan á Lakjuni.

Tá mentamálaráðharrin var liðugur við sína røðu, tók stjórin í Norðoya Sparikassa orðið. Hann legði út við at koma við eini umbering til allar luttakararnar.

– Eg má koma við eini umbering til tykkum listafólk fyri, at eg í Sosialinum segði, at um eini fimm heilt stór talentir eru millum tykkum seksti, so er tað bara gott. Hetta er fantastiskt, og tað hevur tikið meg fullkomuliga av bóli, segði Eyðfinn Reyðberg millum annað.

Og hann tók ikki ov dýran til. Øll tey mongu listaverkini á veggunum í Skálanum taka uttan iva luftina frá mongum í teirra fjølbroytni og vakurleika.

Fram í Ljósið verður hangandi uppi í Skálanum inntil 21. mars.

Ársaðalfundur

**Boðað verður við hesum til ársaðalfundar í P/F Føroya Banka**

**hósdagin 25. mars 2004 kl. 17.00**

á Hotel Føroyum, Tórshavn, við hesi dagsskrá:

1. Frágreiðing nevndarinnar um virksemi bankans í farna ári.
2. Framløga av ársroknskapi við grannskoðaraátekning til góðkenningar og ársfrágreiðing.
3. Avgerð um nýtslu av avlopi sambært góðkenda ársroknskapin.
4. Val av nevndarlimum

   *Høgni Hansen og Jákup Jacobsen standa fyri vali.*

5. Val av grannskoðarum.
6. Uppskot frá nevndini

   *Nevndin mælir til at hon fær heimild til innan endan av mars 2005 at lata bankan ogna sær upp til 1 pst. av partapeningi bankans fyri ein kurs, sum ikki kann víkja frá seinasta almannakunngjørda innara virðinum við meira enn 10 pst.*

7. Ymiskt.

Grannskoðaði ársroknskapurin og ársfrágreiðingin liggja frammi á skrivstovu bankans í Húsagøtu 3 í Tórshavn.

Atgongumerki til aðalfundin verða útflýggjað á deildum bankans í seinasta lagi fríggjadagin tann 19. mars 2004.

Tórshavn, tann 19. februar 2004.

NEVNDIN

FØROYA BANKI

# Nú ber til at telja fostur í seyði

**Nú er alt meira vanligt í londunum uttan um okkum, at seyðamenn og bøndur fáa fosturteljara á vitjan. Við einum ultraljóðs skannara verður hvør ær skannað, og við hesum kann staðfestast hvussu nógv fostur hvør ærin ber, ella um hon í heila tikið er kviðin**

SEYÐAHALD
*Tíðindaskriv*

Nú er so tikið stig til, at vit skulu gera eina slíka roynd í Føroyum. Ein norðmaður, Jan Johansen kemur til Føroya, hósdagin 18. mars. Ætlanin er at gera eina roynd á Hoyvíksgarði hjá Sigert Patursson á Vatn skørðum sama kvøld millum kl 19.30 og 21.00.

Væntandi verða uml 60 seyðir skannaðir.

Hetta er tann maðurin, sum hevur lært hinar »fosturteljarnir« í Noregi at nýta skannaran. Hann skannar seyð um alt Noreg, í Íslandi, á Fair Isle, og í New Zealandi. Hann hevur eisini starvast sum vinnuligur seyðaklippari í fleiri ár, og hevur tí hollar royndir innan seyð.

Sambært Jan Johansen tekur tað millum 5 og 10 sekund at skannað ærina, og hann gevur 98-100% vissu fyri, at hann gevur upp rætt tal av fostrum.

Besta tíð at skanna er millum 40 og 100 dagar eftir at brundtíðin er byrja, tá fæst mest álítandi úrslit.

Hetta er so mikið væl umtókt uttanum okkum, at Jan Johansen bert kann avseta okkum eitt hóskvøld, hann má til Íslands longu morgunin eftir, so okkurt gott fyri seyðahaldið eigur at liggja í hesum.

Fær man nágreiniliga at vita, hvørjar ær verða tvílembur, hvør sum lembur eitt, og hvørjar eru geldar, leggur tað eitt gott grundarlag fyri hvussu nógv eigur at verða givið hvørjari ær.

Alt eftir umstøðunum í haganum, fóðri, húsið o.s.fr. kann arbeiði leggjast so til rættis at tvílemburnar fyrst og fremst fáa tað tær hava tørv á.

– Tey, ið hava áhuga, eru vælkomin hyggja meðan skannað verður á Hoyvíksgarði hóskvøldið millum kl 19:30 og 21, sigur Jóannes Patursson, bóndi í Kirkjubø. Her verður eisini kaffi og høvi at seta spurningar, sigur hann.



# Alheims festivalur eisini í Føroyum



*Kaj Johannesen, formaður í FUT*

**Mentanarhúsið í Fuglafirði verður um vikuskiftið karmur um føroyska partin av einum alheims festivali, har bólkar um allan heim fara á pall samstundis fyri at hjálpa børnum við HIV/eyðkvæmi**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

One World Beat er fyrsti globali tónleikafestivalurin og Føroyar verða um vikuskiftið partur av hesum festivalnum, har eini 150 tiltøk í fleiri enn 40 londum fara av bakkastokki samstundis. Millum londini teljast Australia, Brasil, Bretlandi, Burundi, Demokratiska Lýðveldinum Kongo, Japan, Kanada, Kenya, New Zealand, Sameindu Arabisku Emiratini, Spania, Suðurafrika, Suðurkorea, Sveits, Thailand, Týsklandi og USA.

Tað er FUT, Føroya Undirhalds Tónleikarafelag, ið hevur savnað fleiri føroyskar tónleikarar, ið fara á pall í Mentanarhúsinum í Fuglafirði 19. og 20. mars.

One world Beat festivalurin hevur uppruna í Sveits. Sjálvbodnir samfelagsáhugaðir tónleikarar, politiskt óheftir felagsskapir og onnur tóku seg saman um at skipa vælgerðarkonsertir. Festivalurin gongur nú á øðrum ári og hevur ment seg at fevna um allan heim.

## Góð nøvn stuðla

Alheims tónleikafestivalurin er í 3 dagar, tá ein røð av konsertum fer av bakkastokki í nógvum býum - samstundis. Millum annað eru tiltøk í New York, Paris, London, Los Angeles, Sydney og Fuglafirði í døgunum 19.-21. mars 2004 (í Fuglafirði eru tiltøk 19. og 20. mars). Festivalurin loyvir tónleikarum at bera boðskapin um vón gjøgnum tónleikin; Tónleikur ið ger Mun!

Tiltøkini í Mentanarhúsinum í Fuglafirði eru fríggjadagin og leygardagin.

Leygarkvøldið verður fyri tey tilkomnu, og aldursmarkið verður 18 ár.

Kvøldið byrjar við tónleika-café kl. 22-01. Borð við kertuljósum verða sett upp, har fólk kunnu hugna sær samanvið Teimum av Kamarinum, Martini Joensen við orkestri, Ronnie Poulsen frá Singer Songwriter-kappingini, Sámali & Ronnie, Afenginn (einum framúr væl-leikandi donskum folk-rock-bólki), og síðani verður stuðulsdansur við Twilight og Fluffy Toys.

FUT hevur sett atgongumerkini at kosta kr. 100, og til ber at stuðla við at keypa eitt atgongumerki í forsølu, uttan at noyðast at fara til sjálv tiltøkini.

Yvirskotið frá hesum næsta árliga tiltakinum fer til Keep a Child Alive, eitt nýtt framtak við tí endamáli at útvega lívsneyðugan heilivág til børn í triðja heiminum, ið liva við HIV/eyðkvæmi (AIDS). Framtakið er stuðlað av Aliciu Keys.

Afturat tí at luttaka í lokalum tiltøkum kunnu fólk um allan Heim vera við í hesum fjølbroytta átaki við at fara inn á heimasíðuna www.oneworldbeat.org/og lurta eftir internettøkum framførslum og live samrøðum úr øllum heiminum. Á heimasíðuni kunnu fólk eisini downloada tónleik, fara á uppboðssølu ella lata pening til tess at stuðla herferðini móti HIV/eyðkvæmi (AIDS).

Á heimasíðuni oneworldbeat.org ber til at trýsta seg inn á føroyska heimasíðu, har ein fær nærri at vita um føroyska tiltaki.

Phil Collins, Sheena Easton, Bonnie Tyler, Mark King & Level 42 og Michelle Gayle eru almennir One World Beat stuðlar.

Heimasíðan hjá One World Beat hevur dagliga umleið 3.000 vitjandi.

Stuðlaður av UNESCO gjørdi One World Beat festivalurin 2003 sítt fyrsta alheims avrik við sjálvbodnari arbeiðsmegi. Festivalurin náddi eina alheims áhoyrarafjøld, ið útvegaði pening til nógv vælgerandi endamál.

## Keep A Child Alive

Keep A Child Alive hevur til endamáls at útvega lívsneyðugan heilivág til tær 3,2 milliónirnar børn, ið liva við HIV/eyðkvæmi (AIDS) í triðja heiminum. Hvønn minutt doyr eitt barn, tí at tað ikki hevur atgongd til lívsleingjandi antiretrovirala (ARV) viðgerð, og Keep A Child Alive hjálpir við at útvega antiretroviralan heilivág til tey børn, ið liva við HIV/eyðkvæmi (AIDS). www.keepachildalive.org

## Føroyingar góðir stuðlar

Kaj Johannesen frá FUT sigur seg vera spentan uppá hendan fyrsta globala festivalin og hann fegnast um, at vælvildin er sera stór, nú fyrireikingarnar eru í hæddini.

- Fólk eru sera fyrikomandi og hjálpsom og vælvildin er heilt einastandandi, sigur Kaj, sum í hesum døgum hevur úr at gera við at fyrireika.

Sosialurin fer alla vikuna at fylgja við og gera burtur úr tiltakinum.




Til Italiu fyri 3595,-
við Atlantic Airways

Mitt í grøna hjartanum á Italia liggur Perugia. Perugia liggur einans 2 tímar frá Rom, 1,5 tíma frá Firenze og 1 tíma frá ungdómsbýnum Rimini.

Flogið verður úr Keypmannahavn kl. 14 til Perugia 3/4, 10/4 og 17/4 2004.

Neyðugt er at liggja nátt í Keypmannahavn áðrenn farið verður til Perugia.

Ferðin kann bíleggjast hjá Faroe Travel, Flogfelag Føroya, Smyril Line, MB-Tours og Fonn Flog.

Íroknað er ferð báðar vegir (Føroyar - Perugia via Keypmannahavn - Føroyar), afturat prísinum kemur ferðaavgjald á 618,- kr.
Gisting er ikki íroknað.

Ferðin er í samstarv við:
FlyPlus www.flyplus.dk

Vanligir ferðaseðlar kunnu eisini bíleggjast á atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS
www.atlantic.fo

SANSIR 355 355